# Verkætlan

# Hvussu fáa vit ment KT Tórshavnar Kommunuskúla?



------------------------------------------------------------------------------------------------------------------
Martin Karl Olsen og Fríðhild Petersen
Telduvarðaútbúgvingin 2002/2004

Verkætlan
Hvussu fáa vit ment KT Tórshavnar Kommunuskúla?

---

Innihaldsyvirlit:


1. Inngangur s.2.
   Endamálsorðing s.2
2. Almenni parturin s.3
   2.1 Um Bitland s.3
   2.2 Forsøga s.3
   2.3 Hugbrá s.3
   2.4 Mál s.4
   2.5 Deilmál s.4
   2.6 Vinnulívið og skúlin mugu onkursvegna draga somu línu s.5
   2.7 KT-depilin settur á stovn s.5
   2.8 Hví Firstclass s.5
   2.9 Teldukoyrikort/telduvarðaútbúgving s.6
   2.10 Fíggjarligi partur KT-depilsins s.6
   2.11 Hvussu sær framtíðin út hjá KT-depilinum s.6
   2.12 Partlig niðurstøða s.7
3. Verkligi parturin s.8
   3.1 Ein lýsing av Tórshavnar kommunuskúla s.8
   3.2 Skeiðini hjá okkum s.9
   3.3 Undirvísing s.9
4. Námsfrøðiligi parturin s.11
   4.1 Hvat sigur lógin s.11
   4.2 Okkara skúli s.12
   4.3 KT-depilin og Læraraskúlin s.12
   4.4 Tann fíggjarligi parturin s.13
   4.5 Hugburður til alnótina s.13
   4.6 Innnótin hjá Tórshavnar Kommunuskúla s.13
   4.7 Partlig niðurstøða s.14
5. Niðurstøða og eftirmeting s.15
6. Keldulisti s.17




Martin Karl Olsen og Fríðhild Petersen.
Telduvarðaútbúgvingin 2002/2004

## 1. Inngangur

Í 1999 bjóðaði KT-depilin á fyrsta sinni út skeið, har fólkaskúlalærarar kundi gerast telduvørðar. Áhugin var stórur, og nógv meldaðu seg til. 20 sluppu gjøgnum nálareyga, har ímillum annar okkara, sum tíverri vegna sjúka mátti steðga á tað eina árið, men slapp uppí part aftur, tá KT-depilin á øðrum sinni, í 2002, bjóðaði telduvarðaskeið út av nýggjum.
Tá annar okkara var á fyrra skeiðnum, tosaðu vit bæði ofta um, hvat gekk fyri seg á hesum skeiði, og ljóðaði hetta at vera sera áhugavert. Her kveiktist ynski um møguliga, at varð skeiðið endurtikið, so fór hin okkara at søkja um upptøku.
Hvat er so orsøkin til, at vit bæði hava so stóran áhuga í KT? Orsøkirnar eru nógvar sjálvsagt, men ein av høvuðsorsøkunum er, at innan skúlagátt kann nógv munagott gerast til frama fyri næmingin, eisini tann næmingin, ið ofta kann kenna seg uttanfyri, tí bókstavir og tøl eru ikki altíð so lætt at fáa skil á.
Løgið, sum lagnur tvinnast saman, tí vit bæði endaðu niðri á Ríkissjúkrahúsinum um sama mundi, og nú sita vit her og skriva uppgávu saman. At vit valdu at skriva saman, kemst av, at vit arbeiða á sama skúla og tosaðu ein dagin um, hvat vit høvdu áhuga fyri at skriva um, og tá høvuðstankar okkara vóru í sama bana, so var tað natúrligt, at vit bæði skriva saman.
Hesir høvuðstankar okkara hava frá byrjan verið sprotnir úr tí hugsan, at tað, vit fóru at takast við, skuldi vera nakað, sum kemur okkara arbeiðsplássi til góðar.
Prátað varð leingi aftur og fram, um hvussu hetta skuldi gerast, og valdu vit í samráð við leiðsluna, at hesin leistur, ið vit koma at lýsa í verkætlan okkara, er ein máti at ítøkiligera okkara hugsan. Tí bleiv endamálsorðing okkara soleiðis:

## Hvussu fáa vit ment KT Tórshavnar Kommunuskúla?

- **Vit vilja virka fyri, at lærarar fáa møguleika at ogna sær eina størri fatan av og fáa eyga á fyrimunir, ið teldan kann geva.**
- **Vit vilja virka fyri, at lærarar fáa møguleika at ogna sær størri vitan og víðkaðan sjónarring, hvat telduni viðvíkur.**
- **Vit vilja royna at geva lærarum størri vitan um, hvørjir møguleikar liggja í forritum, samskifti, innnótini og alnótini og soleiðis kunnu loysa ávísar undirvísingartilgongdir á annan hátt enn tær siðbundnu.**

Hvussu røkka vit hesum málum?

Velja royndarbólk við átta luttakarum við at gera eitt uppslag, har fólk kunnu melda seg til. Av hesum vilja vit hava, at tey umboða teir tríggjar undirvísingarpartarnar umframt báðar polarnar,

soleiðis at skilja, at bólkurin er samansettur av fólki, sum kenna og brúka teldu dagligt og tey, ið hava lítlar og ongar royndir innan teldu. Við at gera á henda hátt, vóna vit at menna ein arbeiðsleist, ið kann nýtast framyvir. Hetta verður útgreinað nærri í tí verkliga partinum.

Innihaldið kemur at fevna um tríggjar partar, ein almennan part, har vit royna at lýsa, hvørji sjónarmið og hugbrá rørast innan KT í skúlahøpi og í vinnulívinum, ein verkligan part, sum viðger sjálva arbeiðsgongdina, og so ein námsfrøðiligan part, har komið verður inn á fólkaskúlalógina og kunningartøkni í fólkaskúlanum í 2004. Her koma vit eisini inn á tær námsfrøðiligu royndir, vit gjørdu, tá vit hildu skeiðið, og tankar, ið rørast innan KT-námsfrøði. Vit enda við niðurstøðu, har tikið verður samanum.

## 2. Almenni parturin.

Í hesum parti er ætlanin at varpa ljós á nakrar tankar um KT í Føroyum og kanna um nøkur hugbrá – vision - er á økinum sum heild, og í hvussu stóran mun hesar eru farnar av bakkastokki. Ein av verkætlanunum, vit hava hugsað um, er tann so sonevnda Bitland. Her er nakað av tí, sum stendur um Bitland á teirra heimasíðu. Vit høvdu hugsað okkum at hitt onkran teirra á máli, men vit hava ikki fingið fatur á teimum, hóast royndir eru gjørdar til tess.

### *2.1* Um Bitland.

Bitland verkætlanin er ein forkanning at vita, um Føroyar kunnu gerast ein nýskapandi fyrimynd í gagnnýtslu av tøkni. Hon gekk frá apríl til november 2003, men er síðan longd, tí man metir, at tørvur er á slíkum verkætlanum. Hon verður samskipað av TK-stovuni.
Verkætlanin er fíggjarliga stuðlað av Sparikassagrunninum, ENI, Føroya TELE, Atlantic Airways og Sansir, og harafturat veita KT-felagið og TK-stovan stuðul á annan hátt.

### *2.2* Forsøga.

Við støði í arbeiði hjá Michael Reveal við networking og teimum møguleikum, sum eru komnir við sambandinum við Intel, verður henda verkætlan sett í gongd.
Víst verður til ritið, sum lýsir almenna føroyska KT politikkin, sum nevnir somu hugsjónir og hevur orðaði mál um:

- føroyska KT útflutningsvinnu
- førleikamenning og gransking
- netverksskipanir og marknaðarføring uttanlands

### *2.3* Hugbrá:

- Bitland - nýskapandi fyrimynd

- Føroyar skulu vera fyrimynd hjá øðrum, tá umræður gagnnýtslu av tøkni.
- Landið er lítið, skjótt frá hugskoti til veruleika, og her er lætt at íverkseta loysnir, sum fevna um eitt heilt samfelag. Hetta ger okkum áhugaverd.
- Altjóða áhugi er fyri skilagóðari og nýskapandi nýtslu av tøkni.

- Bitland átakið hevur til endamáls at fáa fremstu útlendsku tøknifyritøkurnar at royna og menna nýggja nýtslu av tøkni í Føroyum í tøttum samstarvi við føroyskar fyritøkur og stovnar.
- Føroyar eru longu eitt tøkniliga framkomið samfelag, og harafturat skulu vit gerast millum tey fremstu at gagnnýta tøkni.

***2.4* Mál:**

Høvuðsendamál við hesi verkætlan er:
- at kanna møguleikarnar fyri at Føroyar kunnu gerast eitt land (Bitland), har altjóða virkir saman við føroyskum virkjum royna nýggja tøkni.

Onnur endamál:
- at skapa størri samstarv millum føroysk virkir, sum eru við í KT vinnumenningini í Føroyum – KT virkir og teirra brúkarar.
- at gera føroysku vinnuna varhugað við fyrimunirnar við at skapa netverk út um landoddarnar.
- at seta í gongd BITLAND verkætlanir, har føroysk virkir samstarva við altjóða virkir.

***2.5* Deilmál:**

- at koma á WEF World Economic Forum listan
- minst 10 kontaktir millum føroysk virkir og útlendskar grannskingarstovnar, lærustovnar, fyritøkur og venturefeløg
- minst 3 ítøkiligar verkætlanir burturúr omanfyrinevndu 10 kontaktum
- minst 3 BitTing (seminar)
- minst 3 BitStovur (verkstovur) við luttøku av útlendskum og føroyskum virkjum.
- eftirmeting/álit við strategiskum perspektivum um Bitland

Her er eitt lítið dømi um ein fyrispurning, sum er komin til Bitland:

Ein amerikonsk fyritøka, ið ger loysnir til web-cam video-stevnur gjøgnum alnótina hevur sent ein konkretan fyrispurning um at gjøgnumføra beta-test (fyrsta roynd) av teirra tólbúnaði í Føroyum.

Bitland er ein sólskinssøga um, hvussu vit við at standa saman kunnu seta Føroyar á KT-heimskortið og soleiðis vinna Føroyum eitt dygdargott støði at standa á í heimshøpi.

### *2.6* Vinnulívið og skúlin máa onkursvegna draga somu línu.

Tað eru sera góðir og stórir tankar um at gera Føroyar til ein depil í øllum heimstelduruðuleikanum. Her verður tørvur á at taka lógvar saman og lyfta í felag. KT-depilin hevur í fleiri ár arbeitt við at menna KT innan skúlans gátt, og í hesum sambandi hava vit prátað við Regin Ellingsgaard, leiðara á KT-deplinum.

### *2.7* KT-depilin settur á stovn.

Ein nevnd varð sett av táverandi landstýrismanni í mentamálum at gera eitt álit um kunningartøkni í fólkaskúlanum. Álitið varð latið úr hondum í mars 1998. Í hesum áliti vóru nøkur mál sett upp, og høvuðsmálið er, at KT skal vera ein sjálvsagdur liður í undirvísingarheildini í fólkaskúlanum. Tíggju lutmál vóru í tali, og at kalla øll hesi eru sett í verk.
Um summarið í 1998 varð ein trýmannanevnd sett til at fyrireika KT-depilin. Hesi trý fólkini, Regin Ellingsgaard, Petur Zachariassen og Hendrik Jacobsen sótu og arbeiddu við tonkunum um, hvussu hetta skuldi skipast, og hvar KT-depilin skuldi hoyra heima. Teir vóru inni á, at depilin kanska kundi verið saman við Landsmiðstøðini, av tí at hon hevði so stóra fladu út ímóti undirvísingarbrúkaranum. Men tað ynski vann ikki frama, tí ynski var, at depilin skuldi vera fyri seg sjálvan.

KT-depilin varð settur á stovn 1.januar í 1999, og tá varð farið til verka. Depilin hevði nøkur mál, sum skuldu røkkast: teldupost til allar lærarar og næmingar í fólkaskúlanum, eftirútbúgvingar og royna, at tað ikki skuldi vera meir enn fimm næmingar til hvørja teldu. Og eftir tað fekk man so eisini játtað pening til at veita kommunum stuðul at keypa skúlum sínum teldur svarandi til, at tað varð ein telda til hvørjar fimm næmingar tó við ymiskum smávegis frábrygdum. Tær allarflestu kommunurnar brúktu hendan møguleikan.

### *2.8* Hví Firstclass?

KT-depilin fór so í gongd at leita eftir, hvør skipan varð egnað til teldupost til skúlaverkið, og tá varð funnið fram til eina skipan, ið hevði heitið Firstclass. Annað varð kannað, men hetta vísti seg at vera tað besta. Hendan skipan varð gjørd til undirvísing, og tað er ikki postskipanin sum so, men tað, ið liggur aftanfyri – stevnurnar, sum var so tiltalandi. Hildið varð, at hetta kundi roynast í fimm ár, og so fekk man at síggja. 20 januar 2004 vóru fimm ár liðin, síðan byrjað varð, og hendan skipan bara mennist, ikki bert á KT-deplinum, eisini tey, ið hava gjørt hana, menna hana alla somlu tíðina. Tann næsta útgávan, ið kemur einaferð í summar, fer at síggja uppaftur meira ”kul” út, tí tað er tað, næmingarnir vilja hava. Hjá okkum, sum brúka tað sum eitt amboð, kann tað gera tað sama, hvussu

út sær. Hetta skal eisini eggja næmingunum at vera á. Hatta er so alt komið í hús. So er ein ragstrarætlan løgd fram, og so hevur verið gingið eftir hesi ætlanini.

## *2.9* Teldukoyrikort/Telduvarðaútbúgving.

Allir lærarar í fólkaskúlanum fingu námsfrøðiligt skeið í teldunýtslu, og í 2001 vóru allir teir táverandi 751 lærararnir lidnir við at vera slúsaðir ígjøgnum. So skuldu eisini nakrir lærarar hava høvið til at útbúgva seg meira, teir skuldu kunna ogna sær serkunnleika innan kunningartøkni. Løgt varð so ein ætlan um at seta eina útbúgving á stovn, KT-vørðir. Hetta skeiðið varð skipað sum eitt hálvt ársverk yvir tvey ár. 800 tímar, teir 600 tað fyrra árið til tøkni og námsfrøði, og tað seinna, 200 tímar, til eina verkætlanaruppgávu. Hendan skal taka støði í tí fyrra árinum, antin innan tøkni ella námsfrøði, sum KT er partur av. Byrjað varð longu í 1999 við tí fyrsta holdinum, og tey, ið nú ganga, verða liðug til summar. Í dag varðar KT-depilin ikki bara av fólkaskúlanum, men er blivin ein depil fyri alt skúlaverkið. Aðrar uppgávur er at viðlíkahalda postskipanina og heimasíðuskipanina og vera vertir hjá heimasíðum skúlans.

## *2.10* Fíggjarligi partur KT-depilsins.

Enn er tað so, at skúlar hava ókeypis rætt at nýta teldupostskipanina, men KT depilin betalir fyri nýtslu av hvørjum postkassa sær. Í løtuni eru 13.176 brúkarar í skipanini, og tað eru so sjálvandi allir teir fyrstu frá 1999, men tað koma 700 nýggir brúkarar á hvørjum ári pluss allir lærarar og miðnámsskúlar við. Næmingar gerast eitt ár eldri hvørt ár, og tey fara so upp gjøgnum skúlaskipanina, og teir verða ikki strikaðir, teir kunnu halda fram við at brúka hetta her. Ætlan hevur verið frammi um bara at lata teir behalda teirra rætt til at nýta Firsclass. So, fara teir av landinum at lesa, so kunnu teir framvegis vera brúkarar í Firstclass og kunnu ynskja sær eina stevnu. Møguleikarnir eru rættiliga nógvir, tá tað kemur til tað.
KT-depilin er nú ein partur av fíggjarætlanini við egnum rakstrarstaði. Fíggjarætlanin í fjør var 3,4 milliónir, og í ár er hon 3,2 milliónir. Lønir standa fyri 1,3 milliónir harav lønir til KT-vørðarnar, ið eru á skeið. Hetta skal so gjaldast, KT-depilin helvtina og eftirútbúgvingin helvtina.
Firstclass kostar í ár við øllum hasum brúkarunum 289.000 krónur, 20 krónur fyri hvønn í eitt ár. Hendan skipan kann nýtast, hvar tú ert í verðini. Peningurin fer til Rabbikonsolt, sum so betalir víðari til tað, ið fyrr kallaðist Softart, nú eitur tað Opentekst, sum hevur høvuðsstøð í Svøíki. Annars kemur skipanin upprunaliga úr Kanada. At byrja við varð hetta útviklað til Macskipanina, men seinni tillaga til Pc-arar.

## *2.11* Hvussu sær framtíðin út hjá KT-deplinum?

Man skal helst hava nøkur mál. Til tað krevst orka og peningur. Men nakað verður tó arbeitt við nú. Millum annað er ætlanin at gera ein dátugrunn við myndum, føroyskum myndum kundi tað verið,

har ið treytin er fyri, at tá tú letur myndina, so letur tú eisini ”copyright” við. Við øðrum orðum, tað skal vera ókeypis at fara eftir myndini og nýta hana og ikki so, at saksøkjast kann aftaná.
Ein onnur verkætlan, ið er í gongd er, at KT-depilin skal kunna vera ein portalur á tann hátt, at tað ikki bara skal vera ein hurð, men har tú kanst fara inn og leggja tilfar inn, tú hevur gjørt, so onnur fáa gleði av hesum, t.d. undirvísingargongdir og kanna, hvussu veðrið er. Tað vísir seg, at fólk eru sera trek við at lata onnur síggja tað, tey hava gjørt. Akkurát nú er KT-depilin í holt við eitt tiltak, har funnið verður fram til nakrar skúlar í Føroyum og seta vevmyndatól upp, har t.d. síggjast kann út á fjørðin og eisini at fáa nakrar veðurstøðir, ið mála m.a. vætuinnihaldið í luftini og vindstyrki soleiðis, at tú kanst fara inn og kanna eftir, hvussu veðrið hevur verið t.d. tann síðsta mánaðin.
Man kundi hugsa sær at gera eitt miðsavnað internet til skúlaverkið. Sum nú er, bindir man í Telefonverkið bara onkrastaðni. Man kundi eisini hugsað sær, at man hevði eitt knútapunkt, sum var út móti alnótini, og so vóru skúlarnir hektaðir uppí knútapunktið. So skuldi bara hetta miðpunktið forhandla við tey, ið selja alnótisveitingar. Hetta er bara tann tøkniliga loysnin, hugsað verður um. So kundi man havt stórar diskar við data soleiðis, at ikki var neyðugt at farið uttanlanda hvørja ferð, ið farast skuldi eftir upplýsingum, tí tá eru tey dupult so dýr, sum tá tú tekur tær innanífrá.
Hvar leggur man so ta tøkniligu loysnina? Skal hon liggja hjá einum veitara, ella skal hon liggja sentralt. Uppskotið er higartil, at hon skal liggja sentralt. Tað verður arbeitt við tí í Mentamálaráðnum, og skal onkur fara í holt við tað, so verður tað helst KT-depilin. Tað kemur so at krevja nøkur onnur ting av honum enn higartil. Hetta hevur einki við Firsclass at gera, tað kemur at koyra sum higartil. Hetta er sjálvt internetið, hvussu man kann fáa prísin niður. Eisini kemur hetta øllum skúlaverkinum til góðar uttan mun til, hvat tær ymisku kommunurnar siga. Øll, ið eru undir útbúgving - heilt frá barnið av skulu hava ein møguleika at læra tað fjórða mentanarhegnið.
Í fyrstuni hevði KT-depilin avtalu við Telefonverkið, eina fína avtalu, tí tað var pr. teldu. Betalt var so nógv um mánaðin fyri hvørja teldu, har tú kundi brúka telduna, sum tú vildi. Hetta galt allar skúlar, eisini Handilsskúlan. Men so kom fjarskiftiseftirlitið uppí og segði, at hatta ber ikki til, hatta er kappingaravlagandi yvirfyri Kall. Tí bleiv tann avtalan droppað. So mátti hvør skúli sær út at forhandla, og tað bleiv uppá tey vanligu korini.

## *2.12* **Partlig niðurstøða.**

Her eru tankar og hugbrá, ið hava soma ætlanarvirðið, her ræður bert um at flætta ætlaninar saman við einari yvirskipaðari lóggávu, tí gróðrarlíkindini eru av teim bestu. Tó síggja vit fyri okkum eina stóra avbjóðing og tí eisini eina stóra uppgávu fyri framman innan skúlagátt, har hugburður og arbeiðsgongdir skulu endurskoðast saman við, at lærarar fáa møguleika at mennast í samljóði við teirra læraraligu arbeiðshættir. Hugtakið ”næmingalagað undirvísing” kundi í yvirfluttari merking verði” til ”læraralagað upplæran.”

## 3. Verkligi parturin.

### *3.1* Ein lýsing av Tórshavnar kommunuskúla.

Næmingar, umleið 600 í tali, lærarar, 50 í tali, í Tórshavnar Kommunuskúla hava atgongd til umleið 50 teldur. Hesar standa í tveimum teldustovum, og tríggjar standa á bókasavninum. Fimm teldur standa á pedagogiska verkstaðnum, ein í alis- og evnafrøðistovuni og ein í skálanum við sambandi til eina kanón, og verður hetta nýtt sum auditorium. Eisini hevur ein stova teldu við Internetsambandi, so saman við teldunum á skrivstovunum eru um 70 teldur á skúlanum. Telduútbúnaðurin er um fýra – fimm ár, tó eru seks nýggjar teldur í arbeiðsrúminum hjá lærarunum. Umframt alt hetta er eitt redigeringsrúm við nýggjari teldu og við filmsredigeringsútbúnaði.
Í teldustovunum eru teldurnar samanbundnar við einum switchi, og stovurnar samanbundnar við ljósleiðara. Síðan er egin servari, har stýriforritið er Linux. Í løtuni eru samráðingar við býráðið, har ætlanin er at umleggja skúlarnar í kommuni í eitt Citrix net, sum verður centralt stýrt frá býráðnum. Innnótin er sett saman í ein proxyservara, og sambandið út í heim er gott, 2 megabit fast samband. Á skúlanum eru skannarar, printarar og annars tann tólbúnaður, ið krevst. Tað nýggjasta, ið keypt er, er ein litlasarprintari og ein eyka ljóskanón.

Ritbúnaðurin á skúlanum umfatar alt tað vanliga í Office pakkanum umframt eina ørgrynnu av undirvísingarforritum, sum eru komin til skúlan, við tað at skúlin er limur í UniC. Eisini er atgongd til Skolekom og samskiftisforritið er FirstClass. Hertil er at siga, at at tað hevur verið sera tungt at legga UniC forritini inn á skipanina, so øll kunnu fáa gleði av hesum, tí arbeiðsteldurnar hava plásstrot við tí úrsliti, at bert fá av hesum forritum eru installerað í skrivandi løtu.

Reglugerð í fimtan punktum fyri teldunýtlsu skúlans er gjørd og hongur uppi í teldustovunum. Eisini er KT-læriætlan (uppskot) fyri Kommunuskúlan, sum vit koma nærri inn á í námsfrøðiliga partinum.

Teir næmingar í framhaldsdeildini, sum hava valt teksviðgerð og rokniark (tað eitur so, men onnur forrit verða brúkt, tí fleiri næmingar eru sera dugnaligir innan KT) hava fyrstarætt til teldustovurnar hesar tímar. Harumframt hevur skúlin valt sum eina roynd at hava teld sum P-lærugrein saman við øllum teimum handaligu lærugreinunum frá 4. til 7. flokk, hetta tó bert í 5. og 6. flokki. Yvirlit yvir allar hesar tímar hongur á lærarastovuni, og ber til hjá lærarum at seta seg á teir ónýttu tímarnar, um hugur og brúk er fyri tí. Afturat hesum hava 9. og 10. flokkarnir fyrstarætt til teldustovurnar í verkætlanarvikum teirra.
Annars nýtir kvøldskúlin eisini teldustovurnar.

### *3.2* Skeiðini hjá okkum.

Vit tosaðu aftur og fram, um hvussu vit á besta hátt kundu røkka okkara máli, sum vit settu í uppgávuorðingini, nevniliga at víðka sjónarringin telduni viðvíkjandi og geva lærarum alternativar mátar at loysa ávísar undirvísingartilgongdir uppá. Tað sum vit so mettu og eisini gjørdu var, eftir at hava tosað við leiðsluna og við verandi telduvørð, at skipa fyri skeiði. Síðan settu vit okkum niður at seta saman, hvussu leisturin skuldi vera. Vit valdu at hava fýra partar á tveir klokkutímar um vikuna, og saman við leiðsluni komu vit fram til, at mikudagur var best hóskandi. Upprunaliga hildu vit, at seks fólk var hóskandi, men tá vit luftaðu tankan, var sera stórur áhugi millum okkara starvsfelagar, so vit valdu átta luttakarar við samstundis at lova, at hesir skeiðspartarnir skuldu takast uppaftur til várs. Ætlanin var at heingja uppslag á lærarastovuni, har fólk kundi tekna seg, men á veg yvir til talvuna nevndu vit hetta, og beinanvegin vóru átta, ið vildu sleppa upp í part, so uppslagið varð ongantíð hongt upp.

At byrja við ætlaðu vit, at innihaldið í pørtunum skuldi vera:

1: Undirvísingarforrit
Junibakken, Fortæl nu, Chefrens Pyramide og Fun with Words.

2: Arbeiðsforrit
PowerPoint, Audacity, Adobe

3: Samskifti
Firstclass, Messenger (mynda- og ljóðtransmissión)

4: Innnótin og Alnótin
Luna og Google

### *3.3* Undirvísingin

Undirvísingin fyrsta dagin varð løgd til rættis soleiðis, at tvey og tvey vóru saman um eitt forrit, har tey gjøgnumgingu tað saman og løgdu tað fram fyri hinar skeiðsluttakarnar. Hetta gekk sum ætlað og vóru fólk nøgd, tí flestu teirra høvdu ikki sæð hesi forrit áður og vóru sera glað fyri, at okkara skúli hevði fingið hesi forrit tillutað.
At tað júst blivu hesi forrit, kemst av, at eftir at hava gjøgnumgingið øll tey uml. 40 forritini, UniC hevur leigað okkum, varð hildið, at hesi umboðaðu eina best ta breidd, ið skal til, soleiðis at vísast kundi á munir millum forrit, har øll kunnu fáa gleði burtur úr hesum, bæði tann royndi og minni royndi brúkarin, eins og torleikastøði var frá løttum til sera torførar uppgávur.

Annan dagin høvdu vit eisini planir um, at luttakararnir skuldu arbeiða á sama hátt sum fyrsta dagin við, at tvey og tvey fingu hvør sítt forrit at fordjúpa seg í og síðan leggja fram fyri hini. Men hetta sóu vit beinanvegin, at tað kundi ikki gerast á henda hátt, tí hesi forrit vóru størri, meira tøknilig og tørvaðu, at vit í størri mun greiddu frá hvørjum forritið sær fyri øllum, og tí gingu tveir tímar skjótt, og vit náddu tí ikki at koma ígjøgnum øll. Vit tóku PowerPoint og vóru fólk sera fegin um hetta forrit. Her kann nevnast, at fatanin av, hvat PowerPoint í roynd og veru er, var ikki greið av flestu luttakarunum. Onkur helt, at PowerPoint var, tá ið ein nýtti kanón at leggja fram við og ikki tað, at forritið bar hetta navn. Onkursvegna blivu luttakararnir so hugtiknir av hesum forriti, at tey høvdu ilt við at sleppa hesum, men vit náddu tó at gjøgnumganga Audacity í stórum trekkum hendan dagin, tó uttan at tey fingu møguleika at royna tað sjálvi.

Triðji dagur skuldi nýtast til Firstclass og Messenger, men av tí, at ikki var tíð at koma inn á myndaforritið Adobe annan dagin, byrjaðu vit við hesum hendan dagin. Hetta var sera hugvekjandi fyri luttakararnar, og varð dvalt við hetta forrit so at siga allan dagin. Tó varð eisini aftur nomið við Audacity.

Fjórða dagin varð tí byrjað við Firstclass, og hetta nýttu vit stórt sæð allan dagin við. Nevnast kann, at tvey teirra ongantíð høvdu sæð Firstclass fyrr, og bert tvey teirra vóru stórbrúkarar. Messenger fór tíverri í skuffuna, tí vit fingu teldutrupulleikar, av tí at ljóðkortini í teldunum ikki riggaðu til fulnar, tí at inngangurin ikki riggaðu. Vit hoyrdu ljóð, men kundi ikki leggja ljóð inn.
Móti endanum av skeiðinum, áðrenn vit rundaðu av, varð nomið við Alnótina og mest við leitimaskinuna Google.

Stórt sæð komu vit ígjøgnum meginpartin av tí, vit høvdu sett okkum fyri, tó ikki á tann hátt, vit upprunaliga høvdu hugsað okkum. Tó fingu vit ikki nomið við Messenger og Luna, sum er okkara innnót. Kortini fingu tey møguleika at goyma teirra arbeiði inni á Luna.

Aftaná hvønn dag fingu skeiðsluttakararnir spurnarbløð, har tey skuldu svara spurningum, sum vit høvdu gjørt. Eisini høvdu vit felags eftirmeting av døgunum sum heild, men hetta koma vit nærri inn á í tí námsfrøðiliga partinum.

Hugsað vit omanfyristandandi upplivingar og royndir inn í eina talvu, koma vit til fylgjandi ráskitsu:

| | **Ítøkilig framløguháttur** | **Leitandi framløguháttur** |
|---|---|---|
| **Ítøkilig arbeiðsgongd** | Undirvísingarforrit / arbeiðsforrit | Teldusamskifti / arbeiðsforrit |
| **Leitandi arbeiðsgongd** | Alnót / arbeiðsforrit | Alnót / Teldusamskifti |

Nýta vit hesa talvu í einari fríari útleggjan, kunnu vit varin siga, at hesir fýra bólkarnir – undirvísingarforrit, arbeiðsforrit, samskiftisforrit og alnót / innót – eru í samspæli hvør við annað,

og alt eftir hvussu tú flættar, kemur ein ávís framleiðsla burturúr. Eisini kunnu vit útleggja, at hesir fýra partarnir eru teir grundleggjandi partarnir í KT-høpi og eru tí tær berandi súlurnar. Tá vit eru so avgjørd í okkum støðutakan, hava vit samstundis avgjørt, at leiðin fram ímóti einum skúla, har slík hugsan má valda, er jú tann, at at lærarar mugu fáa innlit og lærdóm hesum fýra súlunum viðvíkjandi. Tí er leistur ella arbeiðsháttur KT-vegleiðarans tann: Skeið fyri lærarum í súlukvartettuni, fyrst á byrjunarstigi og so uppeftir.

**4. Námsfrøðiligi parturin**

Hóskandi kann vera at byrja hendan tátt við at skriva, hvat Søren Kierkegaard skrivar í 1859:

> *At man naar det Sandhed skal lykkes En at føre et Menneske hen til et bestemt Sted, først og fremmest maa passe paa at finde ham der, hvor han er, og begynde der. Dette er Hemmeligheden i al Hjælpekunst. Enhver, der ikke kan det, han er selv en indbildning, naar han mener at kunne hjælpe en Anden. For i Sandhed at kunne hjælpe en anden, maa jeg forstaa mere end han men dog først og fremmest forstaa det, han forstaar. Naar jeg ikke gjør det, saa hjælper min Mere-forstaaen ham slet ikke. Vil jeg alligevel gjøre min Mere-forstaaen gældende, saa er det, fordi jeg er forfængelig eller stolt, saa jeg i Grunden i stedet for at gavne ham egentlig vil beundres af ham. Men at sand Hjælp begynder med en Ydmygelse; Hjælperen maa først ydmyge sig under Den, han vil hjælpe, og derved forstaa, at det at hjælpe ikke er at være den Herskesyge, men den taalmodige, at det at hjælpe er Villighed til indtil videre at finde sig i at have Uret, og ikke at forstaa, hvad den Anden forstaaer.*

Ein kann við vissu siga, at Kierkegaard ikki hevur hugsað í KT-høpi, tá hann festi hesi megnar orð á blað, men tó er tað hugkveikjandi, hvussu væl hann í grundini rakar námsfrøðiliga spíkaran so beint á høvdið. Hava vit hesa grundfatan við okkum í okkara arbeiði sum KT-vegleiðarar, kunnu vit ikki fara heilt av leið.

***4.1* Hvat sigur lógin**

Hyggja vit eftir fólkaskúlalógini frá 1997, er KT bert nevnt einaferð. **§ 9** sigur, at umframt ta undirvísing, ið skal vera boðin sambært § 5, 7 og 8, vera hesar valgreinir og hesi evni at standa næmingunum í 8. - 10. flokki í boði: sjóvinna, landbúnaður osfr. osfr. Nummar fýra kemur tekstviðgerð/rokniark.
**§ 3** er soljóðandi: Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans, smb. § 2, og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.
Í Tórshavnar Kommunuskúla er KT-læriætlan gjørd, men viðmerkjast skal, at hetta er uppskot, sum ikki endaligt er viðtikið at skula brúkast. Í hesum uppskoti verður mælt til, at næmingar skulu duga alt tað vanliga, sum ein telda verður nýtt til í dag: velja eitt forrit í Windows, prenta út, heinta og

goyma fílu, osfr., duga at leita á alnótini og dátugrunnum, duga myndaviðgerð, at gera eina framløgu, duga at brúka arbeiðsforrit og at nýta teldupostskipanir.
Eisini er uppkotið soleiðis lagt til rættis, at námsfrøðiliga verður lagdur dentur á, hvør árgangur skal vera førur fyri at gera hvat. T.d. skal ein 7. flokkur kunna ávegis skriving við Tekstviðgerð og at gera eitt filmshandrit.
Til í fjør var tað bara framhaldsdeildin, ið fekk miðvísa undirvísing í teld (sambært fólkaskúlalógini). Nú fáa eisini teir smærru flokkarnir, ið hava p-skipan undirvísing soleiðis, at næmingar í fimta og sætta flokki kunnu velja millum evning, ítrótt, hondarbeiði, smíð, teld, og køk.

## *4.2* Okkara skúli

Av tí, at teldur ikki eru í hvørjari stovu, so er leisturin, Kommunuskúlin brúkar við at hava koyrt teld inn í p-skipanina, ein góður leistur, halda vit. Vit skulu minnast til, at kunningartøkni ikki er nýtt hjá børnum, tey eru fødd við tí, og fellir tað teimum púra nátúrligt at hava eina ella fleiri teldur at fara til.
Vit máa tíverri viðganga, at í byrjani, tá teldurnar komu í hópatali inn í Tórshavnar Kommunuskúla, tá fóru nógvir tímar til spæl og fjas. Nú er hugburðurin broyttir, fólk hugsa meir um at menna KT soleiðis, at bæði næmingar og lærarar fáa gleði av teldunum. Á skúlanum er gjørdur lítil námsfrøðiligur telduverkstaður við seks teldum, sum er ætlaður til undirvísing og skeiðsvirksemi. Spurningurin er, um ikki eisini lærarar okkara á skúlanum kundu havt hetta í boði – um ikki tveir tímar um vikuna, so tveir tímar um mánaðin ella 14. hvønn dag. Vit mugu ikki gloyma, at summir lærarar kenna seg hóttar av hesum nýggja, tora ikki rættiliga at fara í gongd og eru bangnir fyri at kenna seg býttari enn næmingarnir.Tað vísti seg, at tá vit fóru undir okkara tiltak, so var áhugin sera, sera stórur millum okkara starvsfelagar. Tað bleiv eitt sindur av misstemningi, at ikki fleiri sluppu við, og at vit ikki høvdu upplýst meira um okkara tiltak. Sum áður nevnt, so kom tilmeldingarblaðið ongantíð upp at hanga, tí á veg yvir til uppslagstalvuna høvdu vit longu fingið átta luttakarar. Hetta sigur okkum so mikið, at teldan liggur frammalaga í huganum hjá okkara starvsfeløgum, og hava nokk tey allarflestu hug at duga meir innan KT. Hetta hevði verið ein góður leistur at fylt, soleiðis at fólk kundi hildið seg tíðarførdan viðvíkjandi øllum tí nýggja, ið hendir á KT-økinum. Skúlin hevur pening á kontu, ið kann játtast til skeiðsvirksemi, so hetta kundi væl latið seg gjørt í gerð. Eisini kundi hetta komið undir ársverkið hjá telduvørðinum.

## *4.3* KT-depilin og Læraraskúlin

Tá vit hyggja eftir okkara leisti, so kunnu vit sjálvandi sammmeta við tað, KT-depilin hevur gjørt við at gjøgnumslúsa allar lærarar í Føroyum í KT. Um hetta er gongda leiðin, ella okkara máti, har tað verður gjørt á skúlanum sjálvum, er ilt at meta um, men í øllum føri er tað vert at taka spurningin upp, tí við teimum fyrimunum, ein telda gevur, so kann man ikki lena seg afturá og siga,

at tað gongur nokk. Summir skúlar eru so smáir, at skal hetta kunna lata seg gera á skúlanum sjálvum, so má onkur koma út og undirvísa, tí tað er ikki altíð, at fólk er tøkt á staðnum.
Tað er umráðandi, at Læraraskúlin sum skjótast fer undir at hava KT sum tvungna lærugrein, tí eingin ivi er um, at fjórða mentunarhegnið er komið fyri at vera. Í dag er ikki nokk bert at duga at lesa, skriva og rokna, dugir tú ikki at fáast við eina teldu, so ert tú næstan veingjaskorin, tí teldan er nú vorðin ein so natúrligur partur av okkara dagliga degi – eisini í skúlanum.
Spurningurin er so, um tað er etiskt rætt at krevja av fólki, at tey skulu duga at fáast við teldu. Svarið má vera nei, tað er ikki rætt at krevja nakað av fólki, men sum lærari mást tú seta tær hægri krøv enn ikki lærari, tí havast skal í huga, at børn okkara eru uppald í telduverðini og kenna ikki heimin teldufrían. Tað vildi verið at sammmett við, um vit skuldu farið at brúka segl at sigla við aftur heldur enn maskinorku.
Fyri KT-depilin er eingi ivi, at kunningatøkni er tað fjórða mentunarhegnið (kulturteknik). Hini eru at lesa, skriva og rokna. Tað skal vera ein natúrligur partur av undirvísingini, ikki ein lærugrein sum so, men tað skal vera allastaðni. Tað skal bera til at koma út úr skúlanum og kunna klára seg í einum nýmótans samfelag. Hesi mergjaðu orðini hjá Regini Ellingsgaard siga alt, um hvussu týdningarmikil hesin parturin er blivin í skúlanum.

### *4.4* Tann fíggjarligi parturin

Ein annar spurningur, ið kann setast, er: hví er teldan ikki so natúrlig í skúlanum, tá hon er tað á arbeiðsmarknaðinum. Her má sjálvsagt nevnast tann fíggjarliga partin, tí tað er kostnaðarmikið at fylgja við í øllum tí nýggja, ið kemur á marknaðin. Tað gav at býta, nú 9. flokkarnir løgdu fram teirra verkætlan. Fleiri av bólkunum runnu seg í tøkniligar trupulleikar, tí arbeiði var gjørt heima við stórum teldum, og tá tað skuldi vísast fram í skúlanum, ja so bar ikki til, tí teldurnar ikki vóru tíðarhóskandi.

### *4.5* Hugburður til alnótina

Hvat skulu so næmingar kunna síggja á alnótini? Skulu fløskuhálsar setast á? Her halda vit eins og KT-depilin, at filtrið skal sita millum oyrini, sum Regin Ellingsgaard sigur: ”Grundreglan er tann, at tað, sum tú hevur á skíggjanum, tað skulu tú, lærarin og mamma tín kunna hyggja at í sen, uttan at tað argar nakran av tykkum.” Sjáldan hevur forboð ført til nakað gott, hinvegin skulu næmingar upplýsast og kunnast um, hvat er gagnligt og ikki gagnligt. Telda og mentan er førningur, sum tú ber víðari og leggur afturat.

### *4.6* Innnótin hjá Tórshavnar Kommunuskúla

Luna eitur okkara innót. Í hesa nót eru knýttar allar teldur, ið eru á skúlanum, bæði teldur til undirvísing, skrivstovuteldur, og serligar arbeiðsteldur so sum mynda- og ljóðviðgerðarteldan. Hvør lærari hevur sítt persónliga loyniorð og hevur við henni atgongd til eina persónliga mappu eins og

eina felagsmappu, sum er felagsmappa fyri lærarar, har næmingar ikki hava atgongd. Hinvegin hava lærarar atgongd til felagsmappuna hjá næmingunum. Har afturat hava allir næmingar skúlans sítt persónliga loyniorð við tilhoyrandi mappu, ið er meinlík lærarans. Møguleiki er hjá næmingum og lærarum at koma sær inn á innótina og taka niður tað, sum har liggur og leggja upp, hóast tú ert heima ella hvar tú so ert staddur. Tó skal her viðmerkjast, at vegurin til niðurtøku og uppleggjan er eitt sindur knortlutur, og kundi verið gjørdur smidligari, líkur FirstClass hugsanini, men sjálvsagt so verður FirstClass tikið fram um, um ikki Luna verður tíðarførd. Í hesum sambandi vilja vit her geva okkara KT-vørði – Trygva Jacobsen - tað herðaklapp, ið hann við lít hevur uppiborðið, tí hann hevur sjálvur sett upp okkara innót, og ikki bara tað, men hann hevur prógvað sín telduførleika við at nýta stýriskipanarforritið Linux sum einasti skúli í Føroyum.

### *4.7* Partlig niðurstøða

Tá vit fóru undir at gera ein leist fyri okkara skeið, so var tað fyri eyga, at hesin leistur skal kunna brúkast framyvir á øðrum skúlum við. Eisini hugsaðu vit um, hvussu tað kundi gerast soleiðis, at næmingurin (í hesum føri lærarin) skuldi føla tað, at teir eisini eiga hendan partin av skúlanum. Tá hugsað verður um, at 731 fólkaskúlalærarar hava tikið teldukoyrikortið, so er sannlíkt, at fleiri av okkara lærarum hava hetta skeið. Tí máttu vit eisini hugsað um, at tað vit fóru undir, mátti vera soleiðis, at tað ikki var á sama hátt sum tað koyrikortið. Eftir at hava tosað aftur og fram, komu vit fram til tann leist, sum lýstur er í verkliga partinum. Orsøkin til, at tað blivu tey forritini er, at hesi umboðaðu tað, ið skúlin bjóðar sínum næmingum: lætt tilfar, ið ein og hvør kann fáa gleði av, miðal tilfar, ið flestu næmingar kunnu fáa gleði av og so hampiliga torført tilfar, ið næmingar, ið hava brúk fyri útfordringum kunnu fáa gleði av. Eisini hugsaði vit um, hvørjir lærarar, ið kundu koma við á skeiðið. Her vóru vit bæði samd um, at hetta eisini skuldu umboða ein vanligan klassa, har nøkur duga alt, flestu duga nógv og aftur nøkur, ið ikki hava so lætt við tað, ið skúlin bjóðar fram.
Okkara næmingar (lærarar) høvdu hesi eyðkenni, tvey teirra brúktu teldu nógv, tvey nærum einki, meðan hini fýra vóru miðal brúkarar, soleiðis at skilja, at tey høvdu ikki so nógv brúk fyri okkara hjálp. Hetta vísti seg at vera ein skilagóð loysn, tí teir ”góðu” næmingarnir vóru eitt sindur stoltir yvir, at teir kundi hjálpa hinum, við øðrum orðum, øll á skeiðnum fingu eina góða uppliving við tað, at øll kendu seg væl – bæði við at hjálpa og at fáa hjálp. Hetta kom eisini fram í spurnarbløðunum, tey svaraðu aftaná, at skeiðið var liðugt.
Úr spurnarbløðunum kunnu vit eisini lesa:

- At undirvísingarforritini, ið nýtt vóru, hevði eingin roynt áður. Tá tað vísti seg, at tað ikki var so ringt at installera og opna/brúka eitt forrit, fekk hetta tey at fáa hug at royna onnur forrit.
- Eingin hevði installerað forrit áður.
- Øll høvdu ta áskoðan, at forritini vóru egnaði til undirvísing.
- Skeiðið var væl skipað, tí tað tekur støði í tí einstaka luttakaranum.
- Nú er bara at seta seg niður og innarbeiða ymisk forrit, so tey sita á mønuni.
- ”Eg havi lært at fáa eitt ávíst ”forhold” til telduna.”
- Við tveimum lærarum er altíð hjálp at fáa.

- Hetta at sleppa at royna seg er sera umráðandi
- ”Her er nógv at brúka, men eg veit ikki um eg eri klár enn.”
- Gott skeið, men kanska skuldi færri ting verið gjøgnumgingin, tí tað bleiv eitt sindur ov nógv og av tí sama eitt sindur grunt.
- ”Eg haldi tíðin kundi verið longri t.d. 4 ferðir 3 tímar.”
- Skeiðsluttakararnir hava sum heild ikki innlit í, hvørji forrit er til taks á skúlanum, og hvørjir tøknuligir møguleikar liggja í telduútbúnaðinum á skúlanum.

Hetta gevur okkum nakað at hugsa um. Sum Kierkegaard segði: *….først og fremmest maa passe paa at finde ham der, hvor han er, og begynde der.* Orsøkin til, at vit tóku so nógv forrit ígjøgnum í so stutta tíð, var, at vit máttu taka avgerð um, hvussu nógva tíð, vit fingu frá skúlanum til skeiðsvirksemi, tí lærarar, ið komu á skeiðið, fingu løn. Vit vóru vælvitandi um, at hetta fór nokk at vera ov nógv forrit at ganga ígjøgnum, men hildu, at tað var vert at royna. Nú eru vit hetta klókari. Í einum møguligum komandi skeiðið, har okkara arbeiðsleistur verður nýttur, høvdu vit helst kravt av teimum lærarum, ið skuldu luttikið á skeiðinum, at teir skuldu ímillum skeiðsdagarnar, t.d. millum fyrsta og annan dag royna tey forrit og arbeiðshættir, ið lærdir vóru tann undanfarna dagin, saman við teirra flokki. Herviðmennir tann einstaki lærarin síni evni at geva telduarbeiðshættir víðari til næmingin, men tó skal lærarin ikki standa einsamallur, KT-vegleiðarin skal veita hjálp um neyðugt.

Sum eitt síðsta dømi um, hvat kann koma burturúr einum skeiði sum hesum, kunnu vit nevna ein av okkara skeiðsluttakarunum, sum var/er í ferð við at gera tilfar til byrjunarundirvísing í føroyskum. Undirvísingartilfarið var bygt á glarur saman við bóklingi. Eftir at hon hevði verið á okkara skeiði, var henni greitt, at Powerpoint framløgur kundi gerast ein meira fangangi framløga heldur enn glarur, og hetta sigur hon sjálv hevur givið undirvísingartilfarinum heilt aðrar dimensiónir.

**5. Niðurstøða og eftirmeting**

Vit meta okkum at hava fingið fatur á rætta tráðnum, og at vit við okkara arbeiði hava flutt okkum eitt gott pettið frameftir á rættari leið. Sjálvsagt skal tó her verða sagt, at vit bert hava fingið opað upp fyri einum parti av teimum trupulleikum, ið rørast innan skúlagátt á hesum øki. Her hugsað vit um, hvussu teldunýtsla sum heild skal skipast í teimum einstøku lærugreinunum, hvussu verður við telduútbúnaðinum, verða stovurnar at hava nøktandi útbúnað, leiklutur KT-vørðsins í arbeiðinum hjá tí einstaka læraranum og ikki minst tann fíggjarliga partin. Tankar um skeiðini kundu peika á ávísar undirvísingarpartar, lærugreinir og serlærarar so sum at tónleikalærarar kundu fingið t.d. eitt skeið í arbeiðsforritinum Audacity ella Musicator. Tí eitt er sjálvsagt, at vit kunnu ikki stýra lærarum, men vit kunnu geva teimum hugskot og vísa teimum á gongdar leiðir, og so má tað verða upp til hvønn einstakan, um ein hevur hug at gera brúk av hesum ella ikki.

Eitt tað fyrsta, sum vit KT-vørðar skulu hugsað um, er hvussu vit fáa starvsfólk at kenna, at tey eru ein partur av verkætlanini ella skeiðum (ejerskab). Harnæst verða vit noydd til onkursvegna at flokka lærararnar í bólkar, soleiðis at skilja, at vit fáa givið hvørjum lærara vegleiðing, ið hann/hon metur seg at kunna nýta skilagott í undirvísingarhøpi. Hetta kann gerast við, at um okkara leistur verður nýttur, so verða lærarar á sama støði koyrdir saman, har fólk, ið ikki eru von við teldu fáa meira tíð enn fólk við nógvum telduroyndum. Ein Ráðstevna á Firstclass í samband við okkara telduskeið hevði verið sera hóskandi og viðkomandi, tí á henda hátt kundi ein havt ein savnandi samskipanarlykil inni í skipanini.

Ein kann siga, at skeiðið, vit hava hildið, bert er eitt forgurgl av sjálvum víninum – veruleikanum – soleiðis at skilja, at okkara leistur er ein partur úr einum størri høpi, men at vit hava byrjað eitt verk og síggja okkum í eini heild, har hesin partur er ikki til at skáka sær undan - tí fjórða mentunarhegninum.

Hyggja vit út um landoddarnar, so eru somu tankar at finna har, tað kemur millum annað fram í bókini IT-vejlederens HÅNDBOG – redigeret af Bent B. Andresen.

Hvussu sær so framtíðin út hjá einum KT-vegleiðara?  Vit síggja fyri okkum, at vegurin til tíðir kann verða eitt sindur illgongdur, men at hava fólk áræði og dirvi, kann komast rættiliga skjótt um tær illgongdu gøturnar og inn á tær víðu fløturnar. Alt endar nokk í, hvønn hugburð leiðsla og starvsfelagar hava til KT og hvørjir pengar eru til taks.

Vit kunnu hóskandi enda við hesum dømi tikið úr okkara egna dagligdegi:

Nú um dagarnar, skuldu vit læra fyrsta flokk um FirstClass, og vit hugsaðu at byrja hóvliga. Men tað serstaka, ið vit her vilja nevna, var, at vit gjørdu brúk av teim møguleikum, sum liggja í teim eldru næmingunum, og tað eydnaðist til fullnar. Vit settu ein fyrstafloksnæming til hvørja teldu og ein 5 floksnæming til at vera hjálpara, uttan at hann skuldi nerta knappaborðið, tað var ognað fyrstafloksnæminginum. Henda roynd var so væleydnað, at vit kundu ikki bara okkum, men vildu nevna hana her - sum eitt viðkomandi royndartiltak.

**Keldulisti:**

Heimasíður:

www.skulin.fo

www.bitland.fo

Samrøður:

Regin Ellingsgaard, Stjóri á KT-deplinum

Forrit, vit hava nýtt:

Junibakken, Fortæl nu, Chefrens Pyramide og Fun with Words.
PowerPoint, Audacity, Adobe
Firstclass, Messenger (mynda- og ljóðtransmissión)
Luna og Google

Bøkur:

IT-vejlederens håndbog, af Bent B. Andresen

Fólkaskúlalógin 1997